Net-Upp:

# Størsta føroyska teldukappingin



*Umleið 95 fólk vóru til Net-Upp-kappingina um vikuskiftið, og tey høvdu øll egna teldu við*



*Summar kappingar vóru skipaðar sum liðkappingar, meðan aðrar vóru einstaklingakappingar*



*Spælt varð frá fríggjadegnum klokkan 19 til sunnukvøldið klokkan 21*

**Um vikuskiftið varð skipað fyri stórfingnari teldukapping í hølunum hjá Føroya Tele. Heilir 95 telduknáir føroyskir ungdómar í ymsum aldursbólkum luttóku í Net-Upp-kappingini, sum er tann størsta av sínum slag í Føroyum**

TELDUSPØL
*Hans Kárason Mikkelsen*
*mikkels@fas.harvard.edu*

Tað er eitt vælkent fyribrigdi millum ung fólk í Føroyum og kring allan heim. Tey taka teldu í hendi og savnast í felagshølum, har teldurnar verða settar saman við káplum. Síðani verða ymisk spøl sett í gongd, til dømis skjótispøl, har luttakararnir kappast ímóti hvørjum øðrum í liðum ella sum einstaklingar. Felagsheitið fyri hesar samkomurnar er LAN-party.

Um vikuskiftið var tað Føroya Tele, sum við sínum stóru hølum var karmur um eitt LAN-party. Teldurnar vórðu settar upp í kantinuni í høvuðssætinum hjá felagnum. Heili 95 fólk høvdu teknað seg til Net-Upp, og komu tey øll við egnari teldu til LAN-ballið. Nú skuldi spælast, og tað væl og leingi. Kappingin byrjaði fríggjadagin klokkan 19, og seinasta teldan varð ikki sløkt fyrrenn sunnukvøldið klokkan 21.

### Strategi- og skjótispøl

Tað var Bergur Strøm frá Føroya Tele, sum var stigtakari til tiltakið, sum var tað størsta av sínum slag í Føroyum higartil.

-Tiltakið gekk ógvuliga væl. Hóast við høvdu nakrar byrjunartrupulleikar við netverkinum fríggjakvøldið, so vóru fólk sera fegin um kappingina, sigur Bergur Strøm.

Kappast varð í fýra ymiskum telduspølum: Starcraft, sum er eitt strategispæl, og í skjótispølunum Call of Duty, Counter Strike, og Unreal Tournament 2004.

Bergur Strøm sigur, at meirilutin av luttakarunum var um 16 ára aldur, men at tað vóru alt frá 10 til 27 ára gamlar eldhugaðar teldusálir.

### Nokk av mati og drekka

Bergur Strøm var ikki einsamallur maður á Føroya Tele-borgini, tá fólk fóru at kappast í ymsu spølunum. Ein skúlaflokkur hjálpti til við at selja mat og okkurt drekkandi, meðan avtala varð fingin í lag við Pizza 67 um at fáa mat sendandi niðan í kantinuna annan hvønn tíma.

Bergur Strøm vónar, at høvið verður at skipa fyri líknandi tiltaki í framtíðini.

-Tað veldst um, hvat leiðslan sigur. Um eg fái loyvi, so geri eg tað aftur, sigur Bergur Strøm um størsta føroyska teldutiltak av tínum slag.

# Spæla ímóti kammeratum

**-Tað er stuttligari at spæla ímóti kammeratum enn ímóti telduni, sigur ein av luttakarunum á Net-Upp-teldutiltakinum, sum var um vikuskiftið**

TELDUPRÁT
*Hans Kárason Mikkelsen*
*mikkels@fas.harvard.edu*

Høgni Vesturklett var ein av vinnarunum av Net-Upp, sum Føroya Tele við Bergi Strøm skipaði fyri frá fríggjadegnum til sunnudagin. Høgni Vesturklett spældi á liði saman við tveimum øðrum telduspælarum, og hansara lið vann kappingina, tá spælt varð í strategispælinum Starcraft.

-Eg varð ringdur upp og spurdur, um eg hevði hug at taka lut í teldukappingini um vikuskiftið, tí teir manglaðu ein spælara til liðið, sigur 22 ára gamli Høgni Vesturklett.

-Vit á liðnum høvdu allir royndir í Starcraft, og mótstøðuliðini vóru generelt ikki góð. Tað var lætt. Tað var manglandi mótstøða, sigur Høgni Vesturklett.

Starcraft snýr seg um at samla sær tilfeingi, og so byggja sær ein her. Tann herurin skal so stýrast, og leypast skal á. Hvør spælara hevur sín bý.

-Tað er stuttligt at spæla hesi spølini, men tað er nógv stuttligari at spæla ímóti kammeratum enn ímóti telduni, sigur Høgni Vesturklett, spurdur hví so nógv fólk høvdu teknað seg til slíka kapping.

Høgni Vesturklett sigur, at hann savnast saman við kammeratum annan ella triðja hvønn mánað, har teir seta teldurnar saman og spæla ímóti hvørjum øðrum.

## FAKTA

**Vinnarar av Net-Upp:**

**Starcraft: (liðkapping)**

Høgni Vesturklett
Uni Johannesen
Bogi Jørgensen

**Call of Duty: (einstaklingakapping)**
1. Pætur Breckmann

**Counterstrike: (liðkapping, størsta kappingin)**
1. Perfect[5]
2. tnR

**Unreal Tournament 2004: (einstaklingakapping)**
1. Bjarni Jacobsen
2. Boas Hansen

**Viðmerking:** Bergur Strøm sigur, at liðini Perfect[5] og tnR vóru á einum hægri støði enn øll hini. Perfect[5] hava verið uttanlanda og kappast í Counter Strike-kappingum. Bæði liðini eru semiprofessionel, sigur Bergur Strøm